
Anna V. Ellingsgaard er nýggjur formaður í Føroya Blaðmannafelag

## Nýggjur formaður vil styrkja eftirútbúgving

Blaðmannafelagið hevur fingið nýggjan formann. Á eykaaðalfundi hjá felagnum varð 40 ára gamla Anna V. Ellingsgaard úr Klaksvík, vald til formann. Hon er útbúgvin cand. mag. í enskum og norðurlendskum máli, men er í løtuni í ferð við at leggja seinastu hond á útbúgving sína sum journalistur á Danmarks Journalisthøjskole í Århus. Anna V. Ellingsgaard hevur fimm ára royndir sum skrivandi blaðfólk á Sosialinum og Fregnum.Umframt at fáa gongd á eftirútbúgving fyri limirnar, ætlar nýggi formaðurin sær at arbeiða miðvíst fyri at gera Blaðmannafelagið til fakfelag fyri øll fjølmiðlafólk í landinum. Í løtuni er felagið bert fakfelag fyri redaktionell starvsfólk á bløðunum og áhugafelag hjá teimum, sum arbeiða í útvarpi og sjónvarpi. Síðstnevndu eru eru limir í Starvsmannafelagnum. Hinir nevndarlimirnir í Blaðmannafelagnum eru Álvur Haraldsen, myndamaður á Sosialinum, og Ingolf S. Olsen, journalistur, úr sjónvarpinum.

# Løgmaður vil ikki seta eld í

**Løgmaður hevur fingið leyðsliga áheitan um at taka ætlanina um at gera Føroyar til eitt valdømi, til umrøðu í samgonguni, men løgmaður vil ikki seta eld í og tí vil hann ikki út við, hvat hann sjálvur heldur**

VALSKIPAN
*Áki Bertholdsen*
aki@sosialurin.fo


*Løgmaður vil ikki siga um hann heldur, at Føroyar skulu verða eitt valdømi. Men uppskotinum frá Anfinni Kallsberg tekur hann so undir ongum umstøðum undir við*

Nú eru útlit til, at uppskotið hjá Edmundi Joensen um at gera allar Føroyar til eitt valdømi, verður tikið til umrøðu í samgonguni.

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, sigur, at tinglimir í samgonguni hava leyðsliga heitt á hann um at taka málið upp í samgonguni.

- Tá ið eg fái slíkar áheitanir, plagi eg at eftirlíka teimum og tað geri eg eisini hesuferð, sigur hann.

Hinvegin sigur hann, at fyribils er hesin spurningurin komin so stutt áleiðis, at enn tað er óvíst um tað verður eitt ítøkiligt mál og tað verður so ikki tikið til umrøðu í samgonguni, fyrrenn hann fær eina formligа áheitan um tað.

Men hinvegin sigur Løgmaður, at tað er púra greitt, at tað verður ikki samgongan, sum fer at leggja uppskot fyri Løgtingið um at gera allar Føroyar til eitt valdømi.

Hann ásannar, at tað er ikki semja í samgonguni um hetta.

- Hetta er ikki eitt samgongumál og tað verður ikki eitt samgongumál. Hetta er eisini eitt mál, sum flokkarnir eru ósamdir um innanfloks og har hvør tinglimur hevur sína støðu.

Um vikuskiftið staðfesti Marjus Dam, sambandsmaður úr Vágum, at leggur partamaður hansara, Edmund Joensen, uppskot fyri Løgtingið um eitt valdømi, er tað at seta samgonguna í vanda.

Sostatt hevði hann hug at gera hetta til eitt samgongumál.

Men tað er Løgmaður ikki treytaleyst samdur í.

- Sum sagt er hetta ikki eitt samgongumál, men ábendingar eru um, at tað verður tikið upp í samgonguni.

*Men fæst semja ikki í samgonguni um málið og Edmund Joensen, sum eisini er í samgongu, kortini leggur tað fyri Løgtingið av sínum eintingum er tað so ein politiskur trupulleiki fyri samgonguna og ert tú samdur við Marjus Dam um, at hetta er at seta samgonguna í vanda?*

Men hesum fæst ikki eitt greitt svar frá Løgmanni upp á.

- Lat okkum síggja, hvat viðgerðin í samgonguni fer at bera við sær. Hinvegin hevur Edmund Joensen fullan rætt at leggja tey uppskot fyri Løgtingið, hann hevur hug til.

Men um tað verður ein politiskur trupulleiki, vissi ein tinglimur hjá samgonguni leggur eitt so víðgongd uppskot fyri Løgtingið, uttan at samgongan er samd um tað, kann løgmaður onki siga um enn.

- Tað vita vit ikki enn. Tað er væl tí, at tinglimir í samgonguni røgva framundir at fáa tað til umrøðu í Løgtinginum.

*Men hvat skal so endamálið við eini møguligari umrøðu í samgonguni vera?*

- Tað er fyrst og fremst fyri, at hvør tinglimur skal sleppa at siga sína hugsan, er tað einasta, løgmaður vil siga um tað.

Sjálvur fæst Løgmaður ikki siga, hvussu nógv valdømi, hann heldur, skulu vera í Føroyum

*Eigur tú sum Føroya Løgmaður ikki at hava ein støðu til hetta?*

- Tað havi eg eisini. Men hetta er eitt mál fyri Løgtingið burturav og har havi eg ikki atkvøðurætt og tí vil eg ikki ávirka støðuna. Samstundis er greitt, at flokkarnir standa ógvuliga spjaddir í hesum máli og tí haldi eg ikki at tað er rætt av løgmanni at seta eld í við at geva sína støðu til kennar.

### Fyri og ímóti

Annars heldur Løgmaður, at tað eru bæði fyrimunir og vansar við at skipa Føroyar sum eitt valdømi.

- Tað er ongin loyna, at soleiðis, sum tinglimir eru býttir ímillum flokkarnar, er ikki heilt rættvíst eftir atkvøðutalinum. Og tað er matematiskt prógvað, at verðar Føroyar eitt valdømi, hevði hesin ójavni verið útjavnaður.

Tað er eisini greitt, at tað er ójavnt, hvussu nógvar atkvøður, hvør tinglimur kostar í teimum ymsum valdømum og sostatt eru summi valdømi yvirumboðað á Løgtingi og onnur eru undirumboðað. Verða Føroyar skipaðar í eitt valdømi, var hesin mismunur sjálvandi eisini burtur.

- Royndirnar vísa eisini, at nógv torførari at fáa konufólk at stilla upp í teimum smærru valdømunum, enn tað er í teimum størru og tí er væl trúligt, at fyri javnstøðuna í Løgtinginum, hevði tað verið ein fyrimunur við einum valdømi og at tað hevði styrkt kvinnuligu umboðanina í Løgtinginum.

Tey, sum vilja hava Føroyar til eitt valdømi, hava ført fram, at ein stórur fyrimunur við tí er, at so høvdu vit sloppið undan tí, ið summi av teimum kalla oyðileggjandi lokalpolitikki.

Men tað ivast løgmaður í.

- Spurningurin er, hvat er lokalpolitikkur og, hvat er landspolitikkur. Tað krevst altíð ein meiriluti í Løgtinginum til at samtykkja eitt mál, antin tað so viðvíkur Tórshavn ella Svínoy. Avgerðin verður ikki tikin bara av teimum tinglimum, sum umboða tað einstaka valdømi.

- Men hóast Føroyar verða eitt valdømi, veit hvør einstakur løgtingslimur, hvar hann er sterkastur og fer altíð at føla serliga ábyrgd fyri tí økinum, har hann fær flest atkvøður.

- Hinvegin kunnu allar avgerðir kallast lokalpolitikkur og eisini kann kallast landspolitikkur. At útbyggja flogvøllin í Vágum er sanniliga landsmál

Løgmaður vísir eisini á, at orsøkin til at býta Føroyar sundur í valdømi, er at tryggja, at øll øki í landinum fáa umboð á tingi.

- Verða Føroyar eitt valdømi, er vandi fyri, at summi øki detta heilt niðurímillum og onki umboð fáa á Føroya Løgting. Um tað so er ein fyrimunur ella ein vansi, veldst um, hvønn einstakan.

### Nei til uppskot frá Kallsberg

Hinvegin ger Løgmaður púra greitt, at hann tekur ikki undir við uppskotinum frá formanni fólkafloksins, Anfinni Kallsberg, um at skipa Føroyar í 32 einmans valdømi.

-. Tað er ein skipan, tey hava í Bretlandi, har tann flokkur, sum vinnur, fær sítt umboð valt. Hjá øllum, sum hava valt onnur valevni, dettur atkvøðan burtur og fær onga ávirkan.

- Hetta er ein skipan, har ein flokkur saktans kann fáa meirilutan einsamallur og spurningurin um hetta er ein ynskilig skipan.

- Tað eru tað nógv í Bretlandi, sum ikki halda. Tey halda ikki, at hetta er ein skipan, sum hoyrir einum nýmótans fólkaræði til, tí allar atkvøður, sum eru fyri øðrum valevnum enn tí eina, sum verður valt, fara fyri skeytið. Og tað er ikki eftir nýmótans, fólkaræðislig ari hugsan, at eitt stórt tal av atkvøðum skal fara fyri skeytið og onga ávirkan hava, sigur Løgmaður.